

# Val av limum til Umboðsráðið fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

**Í februar mánaði ár 2010 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

**Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna í Tórshavn innan **1. februar 2010.**

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni á Kongabrúnni ella á trygging.fo.

Kongabrúgvin • Postsmoga 329 • 110 Tórshavn • Tel 345 600 • Fax 345 601 • tf@trygging.fo • www.trygging.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

# Ferðavinnusamstarv millum Grønland, Ísland og Føroyar

Øll, ið hava áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv londini millum, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Umsóknir skulu í minsta lagi fevna um samstarv millum tvey av hesum trimum londunum.

Stuðul verður í høvuðsheitum veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Menning av ‘kombinationsturisme’**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Útbúgving innan ferðavinnu**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
víðkan av altjóða átøkum

Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við.

Umsóknarblað kann takast niður á www.mfa.fo ella www.northatlantic-islands.com
Umsóknin skal skrivast á donskum og sendast til:

**NATA**
**C/o Uttanríkisráðið**
Bryggjubakki 12
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til:
Per Hansen á tel. 306133 ella teldupost: perh@mfa.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsóknir er mánadagin 15. februar 2010.**
Næsta freist at søkja er medio august 2010

NATA er ein avtala millum ferðavinnumálaráðharrarnir í Íslandi, Grønlandi og Føroyar. Endamálið er at menna samstarvið gjøgnum tiltøk innan ferðavinnu í Vestnorden við at styrkja, samskipa og tryggja eitt framrættað samstarv innan tey øki, har felags ferðavinnulig áhugamál eru. Nevdin í NATA hevur um hendi at umsita og deila út pengar til verkætlanarnir.

NATA
North Atlantic Tourism Association

Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00




Thomas Dam búnýti